Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Ár 2011, hin 22. februar kl. 17.30 hevði Klaksvíkar Býráð fund, har hesir limir møttu:

Auðunn Konráðsson, Óli M. Lassen, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Eyðgunn J. Samuelsen, Jákup F. N. Mikkelsen, Steinbjørn O. Jacobsen, Óluva Klettskarð og Hans Arne Bertholdsen.

2011/005.
10/00682 Neystaútstykking í Árnafirði

Umsitingin hevur gjørt uppskot til framhaldsmatrikulering av 10 neystagrundum umleið 100 metrar norður frá verandi neystagrundum í Árnafirði, samstundis sum pláss er lagt av til 11 neystagrundir millum báðar eindirnar, um so verður, at tørvur er á hesum, og at semja fæst um fjørulendið.

Vísandi til tilmælið frá Árnafjarðarnevndini 25. januar 2011, mælir Tekniska Umsiting til,

- ✓ at hildið verður fram at matrikulera sambært rættaðum kortskjali, dagfest 3. februar 2011,
- ✓ at sæð verður burtur frá umsóknum, eldri enn ár 2000,
- ✓ at bert ein neystagrund verður pr. umsøkjara,
- ✓ at neystagrundirnar verða leigugrundir við 20 ára leigusáttmála,
- ✓ at bygt verður frá suðri og norðureftir og leiguøkið latið eftir tørni, so hvørt sum bygt verður,
- ✓ at bygt verður eins bygging eftir sama prinsippi sum neystini við Smyrilsrætt, men tó við møguleika fyri dupultum neysti sambært uppskoti til fasadur, dagfest 30.01.1980.

Haraftrat má støða takast til, um haldast skal fast við tilmælið frá Havnanevndini 14.juni 2005 um at fólk, búsitandi í bygdini, skulu hava fyrsta rætt til neystagrundir í Árnafirði.

Árnafjarðarnevndin tekur á fundi 25. januar 2011 undir við, at tey tøku trý stykkini nú verða lutað út til umsøkjararnar, galdandi frá umsóknunum, sum eru latnar inn frá og við ár 2000. Nevndin mælir til at leiga stykkini út heldur enn at selja, og at bygt verður samanhangandi eftir sama leisti sum neystini við Smyrilsrætt á Strond. Nevndin tekur undir við, at kommunan heldur fram at útstykkja neystagrundir longur heimi sambært kortskjali frá TU, dagfest 3. september 2010.

Havna- og Vinnunevndin tekur á fundi 8. februar 2011 undir við tilmæli frá TU, dagf. 4. februar 2011, og mælir til, at fólk búsitandi í Árnafirði skulu hava fyrsta rætt til neystagrund.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 16. februar 2011 undir við Havna- og Vinnunevndini, 8. februar 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

2011/006.
11/00103 Sethúsagrundøkir á Lánni, Árnafjørður

Sum er, liggja tvær umsóknir til grundøki fram við vegnum, ið nú verður gjørdur inn til økið hjá Bygdarfelagnum Báruni. Sí skriv frá Teknisku Umsiting 4. februar 2011, har tikið verður undir við uppskotinum um grundøkir fram við nevnda vegi. Talan er um umleið 2600 fermetrar.

Vísandi til áhugan fyri sethúsagrundstykkjum í økinum, mælir Árnafjarðarnevndin til, at arbeitt verður víðari við at ogna kommununi fimm grundstykki við hendan vegin á Lánni.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 8. februar 2011 undir við tilmælinum frá Teknisku Umsiting, dagfest 4. februar 2011.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 16. februar 2011 undir við Teknisku Nevnd, 8. februar 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.
Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli, vegna ógegni.

2011/007.
11/00124 Vegaarbeiðir fíggjað undir "Vegir, íløgur" í 2011

Eins og undanfarin ár verður málið um nýtsluna av kontobólkinum "Vegir, Íløgur" lagt fyri viðkomandi nevndir og býráð, har vit seta upp ymisk vegaarbeiðir o.a., sum eru byrjað, og onnur arbeiði, sum hava verið í umbúna. Avmarkaða avsetingin til "Vegir, íløgur" og stóri tørvurin sambært viðlagda málslista (ikki raðfestur enn) viðførir, at trupult er at gera tilmæli um, hvørji arbeiðir skulu raðfestast, tí uttan iva verður neyðugt at fremja nøkur av málunum, sum eru á nevnda lista.
Sí skriv frá Teknisku Umsiting, dagf. 7. februar 2011, har mælt verður til á leið hesa raðfesting í 2011:
*Ymsar gøtur & smærri vegir kr. 300.000,- *Stangaskákið kr. 200.000,- *Oman Reyðhús kr. 300.000,-
*Onnur projekt (parkeringsøkir) kr. 300.000,- *Stoksoyrabakki og síðuvegur kr. 200.000,-
*Vatnverk úti í Svínoy kr. 400.000,- *Gøtuljós kr. 200.000,- *Síðuvegur til Kráargøtu kr. 300.000,-
*Aðrar útreiðslur kr. 680.000,- **Samlað kr. 2.800.000,-

Tekniska Nevnd tekur á fundi 8. februar 2011 undir við tilmælinum frá Teknisku Umsiting, dagfest 7. februar 2011.

Fíggjarnevndin hevði fund 16. februar 2011, har ein meiriluti í nevndini, Gunvá við Keldu, Jógvan Skorheim, Auðunn Konráðsson og Jákup F. N. Mikkelsen, tekur undir við Teknisku Nevnd 8. februar 2011. Ein minniluti, Steinbjørn O. Jacobsen, tekur undir við Teknisku Nevnd 8. februar 2011, tó við tí broyting, at kr. 300.000,- verða fluttar frá játtanini "Aðrar útreiðslur" til Kjalarskákið.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið frá minnilutanum í Fíggjarnevndini fall við 2 atkvøðum fyri (Steinbjørn O. Jacobsen og Óluva Klettskarð) og 8 atkvøðum ímóti (Auðunn Konráðsson, Óli M. Lassen, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Eyðgunn J. Samuelsen, Jákup F. N. Mikkelsen og Hans Arne Bertholdsen). Atli S. Justinussen atkvøddi ikki.
Tilmælið frá Teknisku Nevnd og meirilutanum í Fíggjarnevndini samtykt við 11 atkvøðum fyri og 0 ímóti.

Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

2011/008.
10/00445 Ymsar gøtur og smærri vegir

Borgarar hava av og á gjørt vart við vánalig atkomuviðurskifti til ognir teirra. Niðanfyri eru nevnd nøkur øki sum eru sera illa fyri, av teirri grund, at vit her hava 3-4 húsarekkjur millum vegin omanfyri og vegin niðanfyri.
Umsitingin hevur áður gjørt vart við hesi viðurskifti, og ymiskar loysnir hava verið í uppskoti, hvørjar linjuføringar skulu troytast. Nú verður skotið upp at seta av pening til henda trupulleika – kr. 500.000,-
Sí mál nr. 11/00124, Vegaarbeiðir, fíggjað undir "Vegir, íløgur " 2011.
Sí skriv frá Teknisku Umsiting 4. februar 2011, har mælt verður til at byrja á hesi arbeiði beinanvegin, um undirtøka verður fyri fígging.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 8. februar 2011 undir við loysn 2 í tilmælinum frá Teknisku Umsiting, dagfest 4. februar 2011.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 16. februar 2011 undir við Teknisku Nevnd 8. februar 2011, tó við tí broyting, at avsetingin, sum er fíggjað undir "Vegir, Íløgur, 2011", verður lækkað úr kr. 500.000,- niður í kr. 300.000,- hetta sambært útgreining av avsetingunum í máli nr.11/00124.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/009.
09/00164 Endurskoðan og framhald av byggi- og býarskipanararbeiði kommununnar
Endurskoðan av byggisamtykt í miðbýnum

Á fundi í Byggi- og Býarskipanarnevndini 7. februar 2011 møtti Heri M. Hammer, býarverkfrøðingur, og greiddi frá málinum.
Nevndin mælir til at geva Teknisku Umsiting heimild til at arbeiða víðari sambært leistinum í skrivi, dagfest 26. februar 2009, har umsitingin eisini fær heimild til at gera avtalu um neyðuga ráðgeving. Grundarlag fyri arbeiðinum verður tilfarið, framlagt á borgarafundinum, og annað tilfar, sum kommunan hevur tøkt.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

Frammanfyri standandi mál eru viðgjørd á almennum fundi